# Gvaggaði seg inn í hjørtuni

**Anders Matthesen, »Anden« ella »Dunnan«, ið hann verður kallaður av summum føroyingum, undirhelt fyri fullsettum sali í Norðurlandahúsinum, í gjár. Tey, ið kenna hann frá filmum og øðrum skemti, ið hann hevur staðið aftanfyri, kendu dygdina, ið tey høvdu í væntu**

UNDIRHALD
*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*



*Eftir framførsluna sat Dunnan saman við fyrireikarunum aftanfyri pallin, og øll lótu væl at.*

*Mynd: Bergur Johannesen*

Við filmum sum »Terkel i Knibe« og »Jul på Vesterbro« og undirhaldsleikum sum »Anden paa Coke« og »Hva' snakker du om« og mongum øðrum, hevur Anders Matthsen seinastu árini fylt nógv á danska undirhaldspallinum. Búmerki hansara er ein skuggamynd av eini dunnu, ið eisini fyllir sítt í hansara skemti.

Nógvar av hansara króniku m eru sera moralskt ivasamar. Hann leggur eftir rørslu- og menningartarnaðum, rúsevnismisnýtarum og samfelagnum, men síðan alt er skemt, verður hetta ikki tikið illa upp.

## Fyrstu ferð í Føroyum

»Anden vender tilbage« kallast nýggjasti »stand-up« einmansleikur hansara. Við orðinum »stand-up« gjørdi hann greitt, at her var talan um tað góða gamla uppruna slagið, har skemtarin hevur eina mikrofon, eitt stativ, ein barrstól og eitt glas av vatni – og borðreiðir við góðum hálvum øðrum tíma av skemti.

Ferðin hann er á, við nýggja »Anden vender tilbage« kom til Føroya nú, og hetta er fyrstu ferð hann er her. Til báðar sýningarnar, ávíkavist klokkan 19:30 og 21:30 var so at siga fullsett. Miðalaldurin lá allarhelst um tey tjúgu, men skemti strekti víða og øll sótu í skelli látri.

Hann legði út við eini króniku um Turkaland og síðan um Iran, men gjørdi greitt, at tað var ikki rasisma, ið hann stuðlaði undir. Eftir fyrstu løtuna ivaðist eingin í, at góðskan var í toppi. Restina av kvøldinum fevndu evnini um alt, frá brølapum og suttutrøum, heilt til metroseksualitet og munir á Evropa og Amerika.

Nógv samfelagsrevsan skein eisini gjøgnum skemt hansara. Honum dámdi einki lógir og avmarkingar í fría samfelagnum, í hesi ond, tendraði hann eina sigarett á pallinum, meðan hann drakk eina øl. Hann hugleiddi eisini um skelti, og tók stuttlig dømi fram. – Eg áni ikki hvat stendur á teimum føroysku, men tað er rættiliga stuttligt at "-urin" er á øllum, til dømis "sosial-urin", flenti hann.

### Anders »Dunnan« Matthesen

Hóast einans ein hálvur tími var til næstu framsýning, hevði hann yvirskot til at práta við Sosialin. Hann lat væl at kvøldinum, - Tað var heilt fantastiskt, alt var gott. Salurin og áskoðararnir. Hann legði eisini afturat at hann vónaði at sleppa aftur til Føroya.

Á hesum sinni hevur hann verið í Føroyum í eina viku. Við honum á túrinum vóru hjálparfólk og familja. Hesar dagarnar hevur hann notið landið við at flúgva við tyrluni, vera úti í báti og tílíkt.

- Hetta var fyrstu ferð, síðan eg av álvara byrjaði at gera »stand-up« fyri 15 árum síðan, eg var nervøsur, segði hann. Tað vóru munirnir millum Føroyar og Danmark, ið hann metti vera ein vansa. Tí tað, ið danir halda vera stuttligt, kann vera fullkomiliga øvugt í Føroyum. Hann upplivdi eisini at krónikurnar vóru ymiskt móttiknar, í mun til tað hann var vanur við, summar betri og aðrar verri.

# Norðurlendsk filmsvika

**Spennandi filmsvikan, ið nógv tos hevur verið um í seinastuni, byrjar longu í morgin í Norðurlandahúsinum. Fyrireikararnir eru sera spentir um tiltakið, og ikki minst um undirtøka er fyri hesum. Filmarnir eru ikki líkir við teir, ið vanliga eru at síggja, men eru heldur mentaðir og spennandi á tann hátt**

MENTAN
*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*

Leygarkvøldið klokkan 19 verður Norðurlendska filmsvikan sett. Fyrsti filmurin verður føroyskur, frumsýning av »Mitt Rúm« eftir unga evnaríka Heiðrik av Heygum. Tveir aðrir filmar vera eisini sýndir hetta kvøldið.

Eftirsum filmsvikan liggur í heystferiuni er eisini gjørt nógv fyri tey, ið annars høvdu verið í skúla. Ungdómsfilmar og barnafilmar vera vístir um morgnar og dagarnar, meðan kvøldini eru ætlað til heldur tyngru filmarnar.

Filmar, ið veruliga eru verdir at peika út í úrvalinum eru millum annað: Íslendski krimi filmurin, »Mýrinn«. Belgiski »Control«, ið eru um punk-rokk stjørnuna Ian Curtis, hesin hevur vunnið 25 virðislønir. Svenski ungdómsfilmurin »Ondskan«, ið millum annað varð tilnevndur ein Oscar. Danski »Kunsten at græde i kor«, ið eisini hevur vunnið hópin av virðislønum, har millum Filmsvirðisløn Norðurlandaráðsins 2007. Og ikki minst spennandi íkastið frá Klippfisk, ið kallast »Feskt Føroykst«, her vera sjey føroyskir stuttfilmar vístir.

Til ber at bíleggja sær atgongumerki til sýningarnar. Prísurin fyri hvønn film liggur á 25 ella 50 krónum, eitt atgongumerki, ið er fyri alla vikuna kostar 250 krónur. Meira kunning fæst á www.nlh.fo

| | |
|---|---|
| Sunnukvøld: | Íslendskir filmar |
| Mánakvøld: | Norskir filmar |
| Týskvøld: | Svenskir filmar |
| Mikukvøld: | Finskir filmar |
| Hóskvøld: | Danskri filmar |
| Fríggjakvøld: | Føroyskir filmar |



*Føroyski stuttfilmurin eftir Heiðrik av Heygum, »Mitt Rúm« verður fyrsti filmurin og ein av forvitnisligastu sýningunum alla vikuna.*